**Prentað í Dimmalætting 27. mars 2009**

# Skapanarlæran og intelligent design eiga ongan lut í vísindini

*Hans Andrias Sølvará*

Otto: Apes don´t read philosophy.
Wanda: Yes, they do, Otto, they just don´t understand it.

("A Fish Called Wanda")

Victor á Lakjuni (VL) hevur 20. mars 2009 grein í Dimmu, sum er viðmerking til grein hjá mær frá 3. mars eisini í Dimmu. Hann hevur eisini í Norðlýsinum 24. februar 2009 týtt eina grein um menningarlæruna eftir ein prædikumann, sum er óreiðilig úr enda í annan. Eg undri meg stórliga yvir, at eingin lívfrøðingur hevur gjørt viðmerkingar til kreationistisku uppáhaldini, sum VL borðreiðir við. Tað er vanligt millum kreationistar at tosa móti betri vitandi fyri at villleiða veikar sálir, men eg gangi út frá, at VL, sum ikki tykist hava stórvegis skil fyri vísindaástøði, bara hevur lisið onkran kreationist. Tað tykist í øllum førum løgið, at VL, við støði í tí hann skrivar, kann vera so sannførdur í síni søk.

## Mótsagnir uttan mótstríð

VL heldur, at tá eg skrivi, at skapanarlæran (sum sigur, at Gud skapti lívið á jørðini eftir 6 døgum fyri umleið 6000 árum síðani) er mótprógvað, samstundis sum eg haldi uppá, at uppáhaldið um, at Gud hevur designað lívfrøðiligar skipanir, hvørki kann prógvast ella mótprógvast (t.e. ikki kann testast), so er talan um "*grova mótsøgn*" í míni grein. VL tykist ikki vera vitandi um, at treytin fyri, at tvey uppáhald kunnu vera mótstríðandi er, at tey úttala seg um tað sama. Eg ivist í, um onnur enn VL síggja nakra mótsøgn millum tey bæði nevndu uppáhaldini hjá mær, men eg skal kortini royna skera tað út í papp fyri VL.

Skapanarmytan í 1. Mósebók er (undir tí ivasomu treyt, at hon yvirhøvur skal skiljast sum ein læra/ástøði) upprunaliga sett fram í samsvari við vísindaligu krøvini hjá Karl Popper um falsifiserbarheit - t.e. at hon er sett fram sum eitt neyvt og djarvt orðað ástøði um tann empiriska veruleikan, sum tað er møguligt at mótprógva. Finna vísindafólk prógv fyri, at lívið er ment yvir milliardir av árum, so er ástøðið mótprógvað. Og tað er júst tað, sum vísindini í ríkiligt mát hava funnið prógv fyri. Tað er heilt einfalt eitt vísindaligt faktum.

Men hetta hvørki prógvar ella mótprógvar, at ein Gud (ella Gudar) er til, ið á onkran hátt (sum tó man vera avmarkaður til mekanismur í menningarlæruni) hevur designað lívið, soleiðis sum tað seinna uppáhaldið hjá mær er. Vísindini hava fullkomiliga mótprógvað skapanarlæruna, sum sigur, at lívið varð til eftir 6 døgum fyri 6000 árum síðan, men tey kunnu ikki prógvað/mótprógvað, at Gud/ar á onkran hátt standa aftanfyri skapan og menning av lívinum. Vísindini hava eisini rikið aftur (mótprógvað) ymisk empirisk uppáhald um, hvussu og nær lívið uppstóð og mentist, men tey kunnu einki siga um møguligar metafysiskar Guddómar, sum eru hinumegin empiriska/fysiska veruleikan.

Trupulleikin hjá VL er, at hann í sínum bíbilska trúfesti tykist halda, at verður ein bókstavlig lesing skapanarmytunum afturvíst, so verður uppáhaldið um, at Gud ella Gudar eru til, eisini afturvíst. Tað er ein logiskur feilur, sum hongur saman við, at VL av órøttum setur líkheitstekin millum eina bókstavliga lesing av skapanarmytunum og tað guddómliga. Hetta merkir á ongan hátt, at uppáhaldið um designaragud/ar er vísindaligt. Eitt metafysiskt uppáhald um, at Gud/ar hava designað lívið, sum er tómt fyri empiriskt innihald, kann ikki, eins og ein bókstavlig lesing av 1. Mósebók, testast/mótprógvast, men í báðum førum eru uppáhaldini vrakað sum vísindalig ástøði. Tað seinna tí tað *er* mótprógvað av royndum, tað fyrra tí tað einki sigur um veruleikan og tí heldur *ikki kann* testast/mótprógvast av royndum. Hetta samsvarar alt við vísindaástøðið hjá Karl Popper.

Tað er eingin mótsøgn millum tey bæði nevndu uppáhaldini hjá mær.

**Falsifiserbar vísindalig ástøði og ófalsifiserbar uppáhald**
Tað er tí fullkomiliga burtur úr vón og viti, tá VL staðfestir, at tá uppáhaldið um, at Gud hevur designað lívið ikki kann testast/mótprógvast, so fer skapanarlæran at yvirliva!? Hetta prógvar einans, at VL als ikki hevur skilt tað, sum eg skrivaði um vísindaástøðið hjá Karl Popper. Tað ber ikki til at testa/mótprógva, at Jahve, Óðin, Zeus ella Isis skaptu lívið, men tað merkir ikki, at her er talan um "ástøði", sum vísindafólk taka í álvara. Tvørturímóti eru hesi uppáhald ómøgulig at testa, tí tey vísa ikki til nakað empiriskt, sum kundi mótprógvað tey. Tað ber til at mótprógva eitt empiriskt uppáhald um, at lívið varð til eftir 6 døgum fyri 6000 árum síðan (t.e. skapanarlæruna), men tað ber ikki til at mótprógva, at metafysiskar verur, sum ikki kunnu eygleiðast, standa aftanfyri skapanina. Tílík uppáhald, sum ikki kunnu testast vísindaliga (t.e. ikki eru falsifiserbar) fáa ongantíð innivist í vísindini, men onnur uppáhald, sum kunnu testast vísindaliga, verða standandi til tey verða mótprógvað (t.e. eru falsifiserað). Hóast óvísindalig uppáhald um, at Gud/ar hava designað lívfrøðiligar skipanir ikki kunnu testast, so er skapanarlæran mótprógvað.

VL loyvir sær enntá við støði í síni fullkomiliga misskiltu vísindaástøðiligu fatan at kalla vísindaástøðið hjá Karl Popper (t.e. at testbar vísindalig ástøði yvirliva líka til tey verða mótprógvað), sum man vera eitt tað mest viðurkenda ástøðið innan náttúruvísindini, fyri "*einki uttan møsn*"!? Eg má at taka hattin av fyri dirvinum hjá VL, sum leggur ein av heimsins gitnastu vísindaástøðingum undir at "*møsna*", men mín virðing fyri vísindaástøðiliga kunnleikanum hjá honum kann liggja á einum ógvuliga lítlum stað. VL loyvir sær eisini at halda uppá, at Karl Popper metti menningarlæruna vera nakað, sum ikki kundi testast - t.e. nakað ikki falsifiserbart. Hetta er ósatt og váttar mín illgruna um, at VL ongantíð hevur lisið Karl Popper, men einans hevur kunnleika til vísindaástøði hansara gjøgnum onkran óvitandi ella óseriøsan kreationist. Karl Popper metti eins og flest allir lívfrøðingar menningarlæruna vera "*eitt ómetaliga imponerandi og máttmikið ástøði*", sum "*er væl testað*" (sitat). Støðan hjá Karl Popper til menningarlæruna er júst soleiðis, sum eg við ávísingum til tekstir hjá honum greiddi frá í fyrru greinini í Dimmu.

**Piltdown man og menningarlæran**
VL tykist eisini halda, at m.a. "Piltdown man" skølturin, sum varð funnin í 1908-1911, mótprógvar menningarlæruna. At byrja við hildu granskarar, at Piltdown man skølturin, sum annars illa fekst at samsvara við ta hevdvunnu fataninina av, hvussu menniskja hevði ment seg (heilin var ov stórur), var 500.000 ára gamal, men í 1953 avdúkaðu vísindafólk, at talan var um eitt falsum, sett saman av einum nærum nýggjum menniskjaskølti og

undirkjaftinum á eini orangutang. Hetta er bara ikki nakað, sum á nakran hátt mótprógvar menningarlæruna. Tvørturímóti er tað lættari at fáa eina ørgrynnu av øðrum fossiltilfari at samsvara við menningarlæruna, tá Piltdown man ikki er nakað, sum skal passa inn í samanhangin. Piltdown man var í veruleikanum ein trupulleiki fyri menningarlæruna. Og tað vóru ikki kreationistar, sum settu sítt álit á eina bókstavliga lesing skapanarmytunum, sum avdúkaðu falsanina, men vísindini avdúkaðu sjálvi, at Piltdown man var eitt falsum. Hetta er barnalærdómur, sum stendur í nærum øllum lærubókum um menningarlæruna.

At nýta m.a. Piltdown man sum grundgeving fyri, at menningarlæran er eitt falsum er í sjálvum sær fullkomiliga burturvið. Eins og tað finnast falsaðar beinagrindir og skøltar, soleiðis finnast tað eisini falsaði bíbliuhandrit. T.d. vita granskarar, at Lopes De Stunica og aðrir kristnir í 1521 løgdu eitt falsað grikskt bíbliuhandrit fyri Erasmus fyri á tann hátt at fáa hann at seta tvey falsað ørindi frá umleið 380 e.Kr. í fyrra Jóhannesbrævi, sum nevndu tríeindarlæruna, inn í sína bíbliu. Flyta vit háttalagið við m.a. Piltdown man, sum VL við tilsiping til ein ógvuliga óseriøsan kreationist nýtir sum grundgeving fyri, at menningarlæran er eitt falsum, yvir á bíbliugranskingina, so hevði tað merkt, at tað falsaða bíbliuhandritið hjá Lopez De Stunica o.ø. avdúkaði kristindómin sum eina stóra samansvørjing. Eg ivist stórliga í um VL vil fara so langt við hesi grundgeving, tá tað snýr seg um alla ta jødisk-kristnu siðvenjuna, men tað er júst soleiðis tær kreationistisku heimildirnar, sum VL heilt ókritiskt endurgevur í føroysku bløðunum, grundgeva ímóti menningarlæruni. Í hesi samanberingini tykist menningarlæran á annan hátt annars standa nógv sterkari enn kristindómurin. Tí meðan tað bæði finnast falsaðir skøltar og falsaði bíbliuhandrit, so finst ein ørgrynna av ektaðum/upprunaligum, fossilum, sum stuðla undir menningarlæruna, men tað finst ikki eitt einasta ektað/upprunaligt handrit av bíbliuni.

Her er veruliga talan um nakað, sum avdúkar intellektuella støðið hjá kreationistunum.

**Vísindaliga undirtøkan fyri menningarlæruni**

Tá tað snýr seg um menningarlæruna, leggi eg ikki so nógv í, hvat amerikanskir prædikumenn, verkfrøðingar ella tilvildarligir persónar, sum arbeiða hjá amerikanska kjarnorkustovninum, hava at siga. Tílík fólk, sum eru millum heimildirnar hjá VL, eru ikki á nakran hátt autoritetar á økinum. Aðrir granskarar, sum VL sipar til, virkaðu fyri 100 árum síðani og kunnu ikki longur roknast fyri at vera autoritetar. Tað er heldur ikki nógv annað enn kensluborin (t.e. vísindaliga einkisigandi) uppáhald, t.d. at ”*allar stórar mannavillur í framtíðini verða skýrdar: “Darwinistar*”, sum VL endurgevur hesir menn fyri at hava sagt. Hetta eru sjálvandi ikki nakrar grundgevingar móti menningarlæruni!

Eg eri heldur ikki imponeraður av, at umleið 700 vísindafólk (harav tey flestu ikki eru serfrøðingar og onnur als ikki vísindafólk) hava skrivað undir eitt skjal, har tey siga seg ivast í darwinismuni - ikki menningarlæruni. Fyri nøkrum árum síðani varð ein kanning almannakunngjørd í Newsweek, sum vísti, at av 480.000 jarðfrøðingum og lívfrøðingum í USA, vóru tað einans umleið 700, sum tóku undir við eini bókstaviligari tulking av teimum mótstríðandi bíbilsku skapanarmytunum. T.e. einans umleið 0,14%. Í USA eru sambært *National Science Foundation* 955.000 vísindafólk innan lívfrøði. Allir týðandi vísindaligir felagsskapir hava vent intelligent design bakið. Tann størsti felagsskapurin fyri vísindafólk í USA, AAAS, sum umboðar 120.000 vísindafólk, er bara ein av teimum, sum hevur víst sín fulla stuðul til menningarlæruna og avgjørt afturvíst intelligent design. Listin, sum VL stoltur nevnir, er einans undirskrivaður av 0,01% av øllum viðkomandi

serfrøðingum. Brian Alters, professari við McGill University, sum er serfrøðingur í "*kreationismu-menningarlæru stríðnum*", er í 2006 endurgivin fyri at hava sagt, at 99,9% av øllum vísindafólkum góðtaka menningarlæruna. Tað skerst í øllum førum ikki burtur, at millum vísindafólk er mótstøðan móti skapanarlæruni og intelligent design øtiliga stór. Tað hongur saman við, at vísindaliga próvtilfarið undir menningarlæruni eisini er øtiligt.

Tað er t.d. avdúkandi, at *eingin* vísindaliga góðkend grein (t.e. peer reviewed grein) er til, sum stuðlar skapanarlæruna ella intelligent design (uppgerð frá 2005). Tað er sostatt ikki uttan hald í veruleikanum, tá Jesper Hoffmeyer, doktari við Molekylerbiologisk Institut við Keypmannahavnar Universitet, skrivar í grein í Weekendavisen tann 20. mars 2009, at "*ástøðið um, at allar núlivandi artir eru tillagingar av fortíðar lívsformum og so framvegis aftur í tíðina, so at vit øll í síðsta enda gjøgnum eina óendaliga røð av ættarliðum eru ættaði frá eini og somu (ella hægst nøkrum heilt fáum) upprunaligum urform(um) av lívi ... stendur ... í tí vísindaliga heiminum heilt og aldeilis órørt, og tað er neyvan møguligt at avsanna tað uttan at pantseta sítt skil.*" VL kann halda á við at vísa til nakrar kreationistar, verkfrøðingar, prædikumenn, fráfarnar professarar innan ymisk øki og afturútsiglda og fyri langt síðani afturvísta vitan hjá granskarum frá 1800-talinum (t.d. Spencer, Mivart og Etheridge), sum hann heldur hava mótprógvað menningarlæruna. Hann sannførir ongan, sum kennur eitt sindur til evnið, men tíverri kann hansara skriving ávirka fólk, sum ikki vita, hvussu ómetaliga sterk menningarlæran stendur innanfyri tað vísindaliga samfelagið. Tað undrar meg ikki, at kreationistisku heimildirnar hjá VL ikki leggja fram "prógvini" móti menningarlæruni, sum sambært VL "*ikki kundu afturvísast*", (lesarin fær einans at vita, *at* nevndir granskarar ivast í menningarlæruni, ikki *hví*): Tað finst sum nevnt eingin vísindaliga viðurkend gransking innan alt intelligent design evnið.

**Mótprógvað mótprógv**
Hvussu einkisigandi tey sokallaðu "mótprógvini" eru sæst við at hyggja eftir rættarsakini móti intelligent design (ID) í USA í 2005, har serfrøðingarnir hjá rørsluni noyddust at verja síni sjónarmið móti atfinningum. Hóast ID rørslan savnaði alla sína serfrøði og legði fram allar hugsandi grundgevingar móti menningarlæruni, so var rættarmálið ein eyðmýkjandi ósigur fyri alla ID rørsluna. Meðan menningarlæran er væl testað (t.e. hevur yvirlivað hópin av miseydnaðum royndum uppá at mótprógva hana), so var avhoyringin av Michael Behe professara, høvuðsvitninum, sum tey konservativu kristnu høvdu fingið til at verja intelligent design, eyðmýkjandi fyri hann og ID rørsluna. Har kom sum fyrr nevnt fram, at meðan ein rúgva av populervísindaligum tilfarið er um ID, so finst *eingin* vísindalig gransking, sum stuðlar skapanarlæruna ella intelligent design. Tað hevði tó eydnast Michael Behe at fingið prentað *eina* grein í einum vísindaligum tíðarritið, har hann - uttan at nevna skapanarlæruna ella intelligent design - hevði roynt at sett spurnartekin við menningarlæruna. Hendan greinin gjørdist høvuðsgrundarlagið undir verjuni hjá Michael Behe av ID, men m.a. hon endaði við at fella endaliga dómin yvir ID.

Michael Behe, ein tann fremsti serfrøðingurin og talsmaðurin fyri ID, noyddist (kroystur av spyrjaranum) at viðganga, at sambært hansara egnu gransking kundu samansettar lívfrøðiligar skipanir í samsvar við menningarlæruna mennast yvir eitt tíðarskeið uppá bara "*20.000 ár*". Høvuðsprógvið hjá Michael Behe og ID fólkunum, irreduserbarur kompleksitetur í lívfrøðini (t.e. eitt ástøðiligt uppáhald um, at samansett organ í lívfrøðini, t.d. eyga ella kyknan, ikki kunnu verða skapt stigvíst gjøgnum natúrligt úrval, eins og menningarlæran leggur upp til), fall m.a. við støði í granskingini hjá Michael

Behe sjálvum. Í úrskurðinum hjá rættinum frá 2005 stendur m.a., at "*Behe professari viðurkendi, at granskingin, sum liggur til grund fyri greinini, ikki afturvísti fleiri kendar evolutionerar mekanismur, og at rannsóknin í veruleikanum kundi stuðla undir evulotionerar gongdir, um ein lívfrøðiliga realistisk populatiónsstødd varð nýtt*". V.ø.o. stuðlaði tann *einasta* vísindaliga greinin á økinum einans menningarlæruna. Grundarlagið undir intelligent design (t.e. gudtesuni) sum vísindaligt ástøði hevði ongantíð verið til staðar, men uppáhald, sum skuldu mótprógva menningarlæruna, vórðu sjálv mótprógvað.

Kenneth R. Miller, professari í lívfrøði við Brown University í USA, ið vitnaði sum serfrøðingur fyri rættinum, segði, at "*Intelligent design er ikki eitt testbart ástøði og sum so ikki viðurkent yvirhøvur av vísindaliga samfelagnum ... hugskotið um intelligent design kann ikki falsifiserast, men fleiri av uppáhaldunum hjá intelligent design forsprákarum eru falsifiserað.*" Michael Behe noyddist sjálvur undir trýsti frá spyrjaranum og til miklan stuttleika fyri áhoyrararnar í rættarsalinum at viðganga, at hansara uppfatan av orðinum ástøði var so mikið breið, at hon eisini fevndi um astrologi! Spurdur hvør trupulleikin var við ID svaraði Kenneth R. Miller, at "*Tað undirgravar við følskum grundgevingum vísindaliga støðið hjá menningarlæruni og gevur studentum eina falska uppfatan av, hvat ástøði veruliga merkir.*" Hann legði persónliga afturat, at sum ein trúgvandi persónur, ið var signaður við tveimum døtrum, ið hann uppaldi í kirkjuni, hevði hann verið rasandi, um tær høvdu fingið eina frálæru í skúlanum, har tær beinleiðis ella óbeinleiðis vórðu noyddar til at velja millum Gud og vísindi, tí hann ynskti, at døtrarnar skuldu varðveita sína trúgv. Skapanarlæran og ID eru v.ø.o. ikki bara óvísindaligar; tær seta eisini sambært Kenneth R. Miller professara fullkomiliga óneyðugar kílar ímillum vísindi og trúgv.

Rætturin staðfesti í endaliga dóminum í 2005, at intelligent design hevði einki við vísindi at gera, og at átrúnaðarliga innihaldið í tí var so eyðsýnt, at øll kundu síggja tað: " *... vit staðfesta, at tað átrúnaðarliga sermerki hjá ID hevði verið lætt at sæð fyri ein óheftan eygleiðara, vaksnan ella barn ... Tey øtiligu prógvini í rættarmálinum staðfesta, at ID er eitt átrúnaðarligt sjónarmið, rætt og slætt eitt nýtt navn fyri kreationismuna, og ikki eitt vísindaligt ástøði.*" Intelligent design vísti seg bara at vera enn ein miseydnað roynd uppá at mótprógvað menningarlæruna, sum vísindaliga helst ongantíð hevur staðið sterkari.

**Himmalrópandi naivitetur**

Sæð í hesum høpi er tað spell, at VL rennur ørindi fyri kreationismuna, sum er komin til okkara leiðir úr antivísindaligum umhvørvum í USA. Tað sømir seg illa fyri VL og tænir als ikki føroyska samfelagnum, sum hevur tørv á vísindi fyri at kunna taka á seg tær stóru avbjóðingar, sum framtíðin fer at hava við sær. VL kann fyri mína skyld trúgva uppá allar tær skapanarmytur, sum hann vil (fyri mína skyld kann hann eisini trúgva uppá skapanarmytur, sum eru mótprógvaðar), men fyri Guds skyld kom ikki og fortel mær ella øðrum, at hetta hevur nakað sum helst við testbara vísindi at gera. Menningarlæran, sum er grundarlagið undir allari lívfrøðigransking, hevur staðið allar vísindaligar royndir í 150 ár, meðan skapanarlæran og intelligent design eru í tí sjáldsomu støðu at hava dóm fyri ikki at vera vísindaligar. Tað margháttligasta við øllum hesum er, at kreationistarnir (og VL) tykjast halda, at eydnast tað at mótprógva menningarlæruna (sum tað altso ikki hevur eydnast hóast áhaldandi royndir í 150 ár), so fara vísindafólkini at leita aftur til eina bókstavliga lesing av skapanarmytunum í 1. Mósebók, sum er mótprógvað og annars ikki hevur annað grundarlag at stuðlað seg á enn ein mytologiskan tekst frá 9. ella 8. øld f.Kr.

Tað er so himmalrópandi naivt, at neyðugt er at seta alt skil til síðis fyri ikki at síggja tað.

solvara@olivant.fo
© Hans Andrias Sølvará